Eldraráðið í Tórshavnar kommunu
Tórsgøta 21, 100 Tórshavn
eldrarad@torshavn.fo

TÓRSHAVNAR KOMMUNA

# Eldraráðið 2021 – 2024

**Fundir Nr. 03 2024**
**Dagfesting:08.03.24 klokkan 13:00 – 14:30 í Tilhaldinum.**

**Møtt:** Katrin Holm, forkvinna, Robert Vilhelmsen, næstformaður, Petur Rouch, skrivari, og Marin Rasmussen, limur.

**Fundarskrá:**

1.Fundarfrágreiðing 02-24
2.Eldraheimið uppi í Hoyvík
3.Fund við Eldranevndina í TK
4. Ymist

**Ad. 1 Fundarfrágreiðing 02-24**

Fundarfrágreiðing 02-24 var góðkend.

**Ad. 2 Eldraheimið uppi í Hoyvík.**

Eldraráðið var boðið við í samband við , at Eldraheimið í Hoyvík var sýnt fram.Ein góð uppliving, sum er tiltrongd í kommununi.Men vit undrast framvegis, at vit altíð vera boðin við, tá tingini eru hend. Vit vera ongantíð kunnaði um, hvat fer at henda, hvørjar tankar TK hevur um komandi tiltøk til frama fyri eldra borgaran.

**Ad. 3 Fund við Eldranevndina í TK**

Enn vantar ein formellur fundur við eldranevndina hjá TK. Kristianna Winther Poulsen hevur lovað, at ein slíkur fundur verður hildin, har greitt verður frá hvørjar ætlanir TK hevur eldra borgaranum til frama.

Vit hava vónir um, at ein slíkur fundur kann geva íblástur til ein almennan fund sum upphiting til eldradagin, har eldranevndin hjá TK alment greiðir áhugaðum frá framtíðarætlanum. Hann kundi til dømis verið hildin í aulini í Finsen. Og sett fokus á seinasta eldradagin hjá sitandi Eldraráð, har evnið væntandi verður eldrabústaðir eftir útlendskum mynstri.

**Ad. 4 Ymist**

Nevnt var, at Eldraráðið átti at heitt á Kringvarp Føroya um at seta venjingarprogrammið við fimleiki á skrá aftur fyrrapartar. Nógv høvdu gleði av hesum sendingum.

Tiltakslimur Ingrid Henriksen hevur havt fyrilestrar um heimahjálp. Tað hevði verið eitt hugskot at biðið hana komið á fund við okkum at greitt nærri frá.

Næsti fundur verður hósdagin 4. apríl klokkan 13 í Tilhaldinum.

Skrivað Petur Rouch 11. mars 2024